# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*Erik Fay í sínum Morgan frá 1979. Millum 16 og 18 Morgan Roadster koma til Føroyar í september. Fleiri av bilunum hava V8 motor*




*Martin Rúni Joensen*

## Bilradio
### hósdagin kl. 17.10

Sendingin Bilradio verður send hósdagin kl. 17.05

Í sendingini verður vitjað í Radiobúðini í Runavík, sum hevur spesialiserað seg í ljóðanleggum og navigatión til bilar. Samrøða er við Martin Rúna Joensen, handilsleiðara.

Samrøða er eisini við Erik Fay, sum verður ferðaleiðari hjá einum hópi av enskum Morgan sportbilum, sum koma til Føroyar úr Danmark í september.

Eisini er samrøða við Merner við Skipá frá Føroya Oljusølu og við Thomas Bull Enger frá Auson AB í Svøríki um rustviðgerð av bilum.

Sendingin verður endursend fríggjadagin kl. 8.00 og leygardagin kl. 13.

# Morgan innrás í september



*Erik Fay verður ferðaleiðari, tá Morgan bilarnir koma í september*

Í ár eru 100 ár liðin síðan lítla enska bilverksmiðjan Morgan Motor Company varð stovnað av H.F.S. Morgan í 1909.

Hundrað ára stovningardagurin hjá Morgan verður hátíðarhildin kring um í heiminum við ymiskum tiltøkum sum t.d. í Tivoli í Keypmannahavn, har ein Morgan framsýning verður sunnudagin 14. juni.

Vit í Føroyum koma eisini at merkja 100 ára hátíðarhaldið hjá Morgan. Við Norrønu mánadagin 14. september koma millum 16 og 18 Morgan sportbilar til Føroyar.

Ferðaleiðaran á túrinum verður Erik Fey, sum sjálvur hevur ein Morgan frá 1979.

Erik hevur ferðast nógv í Føroyum sum ferðaleiðari, og hevur skrivað bøkur um føroyska list.

Allir Morgan eru hondgjørdir, og á verksmiðjuni sunnan fyri Birmingham arbeiða umleið 150 fólk, sum framleiða umleið 600 bilar árliga. Tann best kendi Morgan er Roadster V6, ið hevur design frá 1963, ið er lítið og einki broytt síðan tá. Morgan kosta donskum prísum millum eina og tríggjar milliónir krónur.




*Í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið verða 100 Morgan Aero Max jubileumsbilar gjørdir*

# Tíðindaskrivið Ellisakfør

Tíðindaskrivið Ellisakfør (juni 2009) verður í hesum døgum sent út til limirnar í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør. Talan er um 18. árgang av blaðnum, sum er í A5 stødd við 42 blaðsíðum.

Í oddagreinini í blaðnum vísir formaðurin í felagnum, Eirikur Ólason Simonsen, á, at blaðið er vorði størri og hevur meira tilfar enn higartil. Í blaðnum eru áhugaverdar greinar um tiltøk felagsins, sum t.d. túrar við bilum og motorsúkklum bæði í Føroyum og uttanlands, umframt annað søguligt tilfar.

Áhugafelagið Føroya Ellisakfør varð stovnað í 1992, og felagið hevur givið út limabløð øll árini.

Formaður í felagnum er Eirikur Ó. Simonsen.

Heimasíðan hjá felagnum er: www.ellisakfor.com



*Leygardagin 14. mars hevði felagið aðalfund. Myndin er av nevndini í felagnum f.v.: Petur J. Johannesen, skrivari, Hans Jákup Michelsen, kassameistari, Finn Jespersen, nevndarlimur og ábyrgd av Brunninum undir Gráasteini, og Eirikur Ó. Simonsen, formaður. Tiltakslimir eru: John Christiansen og Búgvi Apol*




*Tíðindaskrivið Ellisakfør*